Endalig loysn funnin í Atlantis

Mentanarhúsið Atlantis kann nú fara at virka aftur. Húsið verður nú sjálvsognarstovur, sum eitt serligt stýrið skal ráða yvir.
Mynd: Eyðun Klakstein

Klaksvíkar býráð samtykti týskvøldið uppskot, sum ger mentanarhúsið Atlantis til sjálvsognarstovn við egnum stýri

MENTAN
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Hóast tað var flaggdagur og og annars serligur dagur fyri mentanarhúsið Atlantis í gjár, var einki flagg at hóma uttan fyri húsið.

Týskvøldið gjørdi Klaksvíkar býráð fyribils enda á eini langari og óhugaligari søgu um mentanarhúsið Atlantis. Húsið skuldi virkað sum mentanarhús, men hevur ikki hýst stórt øðrum enn sjónleiki seinastu tvey árini.

Atlantis verður nú sjálvsognarstovnur, sum skal stýrast av einum serligum stýrið. Hetta stýrið er ikki endaligt enn, men Klaksvíkar kommuna og Klaksvíkar Sjónleikarfelag hava valt síni umboð.

Tvey umboð vald

Klaksvíkar kommuna eigur formannin í stýrinum, og á býráðsformaðurin hevur valt Nikolinu Olsen í nevndina. Hon verður samstundis formaður í nevndini.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur valt Jógvan Ravnsfjall, savnsvørð at umboða felagið í stýrið, meðan Norðoya Sparikassi, sum eigur triðja limin ikki hevur sett navn á hendan persónin enn.

Trímannastýrið skal standa fyri rakstrinum av Atlantis, og tað er lagt í hendurnar á stýrinum at avgera, um leiðari skal setast í húsinum.

Ætlanin hevur ikki verið, at stýrið skal standa fyri dagliga rakstrinum, og tí er sannlíkt, at ein leiðari verður settur fyri Atlantis.

Fegin formaður

Formaðurin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráð er fegin um, at málið nú er avgreitt.

– Tað hevur tikið drúgva tíð, men nú eru vit komin á mál. Eg eri fegin um, at eg nú kann lata málið frá mær, og at eitt stýrið kann fáa virksemi í húsið aftur, sigur Jórun Høgnesen.

Mentanarnevndin, sum sat í áðrenn valið, kom væl áleiðis við eini loysn á Atlantis, og nýggja mentanarnevndin hevur so fullført hetta arbeiði.

– Nú verður tað upp til stýrið fyri Atlantis at gera av, hvussu húsið skal rekast, og hvat virksemið tað skal hýsa. Eisini kann stýrið gera av, um leiðari skal setast fyri húsið, sigur Jórun Høgnesen.

Pengar fylgja við

Hóast Klaksvíkar kommuna nú er leys av beinleiðis rakstrinum av Atlantis, og stýrið eisini hevur yvirtikið skuldina í húsinum, ásanna kommunalu myndugleikarnir, at pengar mugu latast til raksturin.

Í ár eru 190.000 krónur tøkar til Atlantis, og tað verður mett, at hetta er nóg mikið av pengum til restina av árinum. Húsið skal eisini skaffa sær inntøkur, men roknað verður við, at mentanartiltøkini neyvan koma at bera seg.

– Vit rokna eisini við, at vit framyvir skulu lata pengar til Atlantis. Hetta er eitt mentanarligt tilboð í býnum, sum vit skulu stuðla. Best hevði sjálvandi verið, um raksturin av Atlantis bar seg, men tað kann ikki roknast við tí, sigur Jórun Høgnesen, formaður í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði.

Tungur rakstur

Atlantis varð umbygt í 1997. Upprunaliga ætlanin var, at umbyggingin skuldi kosta 1,4 milliónir, men endaligi prísurin á stóru umbyggingunum gjørdist tvífalt so stórur.

Húsið er nú í góðum standi, tað er snøgt og innbjóðandi, men skuldin hevur tyngt raksturin av húsinum. Norðoya Sparikassi hevur fíggjað umbyggingarnar, og nú hava partarnir í málinum funnið eina loysn, sum tey halda verður varðandi.

– Ætlanin er nú at fáa støðugt mentanarligt virksemi í húsinum, sigur Jórun Høgnesen.

Í løtuni sýnir Klaksvíkar Sjónleikarfelag leikin Afturgongur í Atlantis, men ætlanin er, at onnur mentanarlig tiltøk, sum verða í Atlantis komandi tíðina.

Fotohandilin AWJ Foto í Klaksvík hevur nú latið aftur

AWJ Foto í Klaksvík latið aftur

Nú er bert ein fotohandil eftir í Klaksvík

SIG APPILSIN
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Fyrr í vikuni lat AWJ Foto í Klaksvík aftur, og nú er bert eini fotohandil í býnum.

AWJ Foto hevur havt deild í Klaksvík í fleiri ár, men nú ætlar handilin bert at hava virksemi á Skálafjørðinum. AWJ Foto hevur gjørt avtalu við PhotoCare í sambandi við afturlatingina í Klaksvík.

Fyri stuttari tíð síðani lat Eiler Foto eisini aftur, og tí er tað bara PhotoCare, sum virkar í Klaksvík í løtuni.

Vitja gamla tingstaðin

Leygardagin verður skipað fyri gongutúri niðan á Katlarnar á Borðoynni, har gamli tingstaðurin var

ÚTFERÐ
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Norðoya Kunningarstova fer leygardagin at skipa fyri einum gongutúri úr Klaksvík og niðan á Katlarnar, har gamli tingstaðurin í Norðoyggjum var.

Tingstaðurin liggur á Borðoynni, 300 metrar omanfyri Árnafjørð, og her plagdu norðoyingar at hittast um vártingseturnar. Teir gomlu dugdu væl at velja sær stað, tí tingstaðurin liggur mitt í Norðoyggjum. Líka langt er at ferðast av Trøllanesi sum av Kirkju.

Ongar skrivligar keldur eru sum siga, nær tingstaðurin varð settur á stovn, men helst hava fyrstu norðmenninir, sum komu higar, brúkt somu skipan sum í Noregi.

Frásøgumaður við

Løgmaður møtti á vártingi fram til 1650, og eftir tað var tað fútin, sum hevði stóra orðið at siga, men eisini sýslumenninir høvdu stóran leiklut.

Tey, sum ælta sær við á forvitnisliga gongutúrin leygardagin, kunnu møta við býráðshúsini, haðani farið verður klokkan 13.00.

Gingið verður niðan við Ravnagili, norður eftir Svøðini, um Árskarð og niðan á Katlarnar. Leiðari og frásøgumaður verður Símun Michael Poulsen.

Kostnaður fyri túrin er 50 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn. Íroknað prísin er søguligt yvirlit yvir hesa gomlu bygdagøtu og tingstaðin, og eisini verður okkurt leskandi at fáa, tá komið er á tingstaðin.

NÝTT GRUNDSKEIÐ Í
NAVISION FINANCIALS
BYRJAR TÝSDAGIN 3 MAI, KL. 9:00
formula.fo
Skeið- og menningardeildin Tel.: +298 311115 - www.formula.fo

Liederkvøld í Norðurlandahúsinum

Hóskvøldið 26. apríl 2001, kl. 19.30 verður 6. konsertin av 7. í vetur hjá Orfeus, tónleikafelag Norðurlandahúsins, og hesaferð verður tað eitt Liederkvøld við sopransangarinnuni Annu Mariu Pammer og pianistinum Mathilde Hoursiangou.

Anna Maria Pammer er sera kend sangarinna, hon hevur tikið prógv við Linzer Musikgynasium saman við víðari lestnaði á Tónleikaháskúlanum fyri Sang og Pall-list. Hon er limur í Altjóða Operahúsinum í Zürich.

Hon hevur millum annað sungið konsertir saman við: Wiener Symphoniker, RAI í Torino og Teatro la Fenice í Venetie, Brucknerorkestrinum, La Chapelle Royale og Klangforum í Wien.

Við á kosertini er eisini Mathilde Hoursiangou. Hon hevur lisið við Conservatoire National Supérieur og tók prógv í konsertklaveri, kamartónleiki og lied-hjáspæli. Mathilde hevur serliga roynt seg innan nútíðartónleik og hevur haft nógvar frumframførslur. Síðan 1998 hevur hon verið lærarinna á altjóða summarakademinum Impuls í Graz.

Á skránni til konsertina í Norðurlandahúsinum eru verk eftir : Alexander Stankovski, Robert Schumann, Johannes Brahm og Baldvin Sulzer.

50 ár
50 ár
Móttøka
Í sambandi við at tað
týsdagin 1. mai eru 50 ár síðani
Leivur Ellingsgaard
byrjaði virksemi sítt í Klaksvík
verður móttøka í Skálanum
frá kl. 17⁰⁰ til 19⁰⁰
Øll eru hjartaliga vælkomin
Sp/f Leivur Ellingsgaard
700 Klaksvík
VÁSTI 457171